LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-179/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Anniku Olsen, løgtingsmanni, um átøk ímóti harðskapi í býarlívinum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær verða átøkini í heildarætlanini fyri at basa rúsevnamisnýtslu sett í verk?
2. Eru ætlanir um at seta í verk tiltøk til tess at basa harðskapinum í býarlívinum?
3. Eru nakrar ítøkiligar samráðingar við kommunurnar um átøk ímóti harðskapi?

Svar:

Til spurning 1.
Heildarætlanin um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu varð handa mær tann 18. mars 2022. Eftir ætlan skal heildarætlanin fremjast yvir 6-7 ár, frá 2022 til 2028. Í heildarætlanini verður mælt til at ein skipan verður gjørd fyri, hvussu heildarætlanin verður sett í verk og framd.

Eftir hesum skal Løgmansskrivstovan hava samskipandi leikutin og eftirlit við, at heildarætlanin verður framd í tráð við politska viljan, tilmælini og tíðarætlanina.

Løgmaður og avvarðandi landsstýrisfólk hava høvuðsábyrgd av, at tilmælini verða sett í verk.
Ætlanin er, at seta ein stýrisbólk, sum skal gera eina ætlan fyri, hvussu heildarætlanin kann setast í verk og hvussu tilmælini kunnu fremjast, umframt at fylgja við gongdini. Løgmansstjórin og avvarðandi aðalstjórar skulu sita í stýrisbólkinum.

Somuleiðis er ætlanin at seta ein verkbólk, sum verður mannaður við umboðum fyri tey fýra avvarðandi stjórnarráðini. Verkbólkurin fær ábyrgd av, at tilmælini verða sett í verk í samsvari við avgerðirnar hjá stýrisbólkinum. Bólkurin skal somuleiðis tryggja tvørgeiraliga samstarvið.

Síðst í mai er ætlanin at hava eina almenna ráðstevnu, har ymisk evni úr heildarætlanini verða tikin fram og umrødd. Eftir hetta verða stýrisbólkurin og verkbólkurin settir.

Til spurning 2.
Seinastu árini hava nógvar søgur verið um rúsevni í føroysku miðlunum. Samstundis er kriminella umhvørvið vorðið alsamt harðari.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Sum løgmaður vil eg at Føroyar framvegis skulu vera besta og tryggasta staðið at liva og vaksa upp, og tí kann eg als ikki góðtaka at harðskapur fer fram í býarlívinum. Hetta var eisini ein av orsøkunum til at eg setti arbeiðið í gongd við einari heildarætlan fyri rúsevnismisnýtslu. Tað er týdningarmikið, at vit fáa munadygg tiltøk at seta í verk, til tess at basa trupulleikunum við rúsevnum og harðskapi.

Tí haldi eg at tað er rættast at fara í samskifti við avvarðandi myndugleikar, fyri at fáa nærri greiðu á, um harðskapurin vit hava hoyrt um síðstu tíðina hongur saman við rúsevnismisnýtslu, hvussu umfatandi harðskapurin í náttarlívinum er, og um nakað ávíst mynstur er í harðskapinum.

Somuleiðis ynski eg at fáa at vita, hvørji átøk best kunnu avmarka harðskapin og gera náttarlívið tryggari. Hetta kundi t.d. verið við at politiið patruljerað til gongu í miðbýnum í vikuskiftinum, og við at Náttarravnarnir blivu upprøðfestir. Eisini hevur tað verið frammi í seinastuni um at seta vakmyndatól upp í náttarlívinum.

Fleiri av átøkunum í heildarætlanini kunnu eisini vera við til at avmarka harðskap. Her hugsi eg eg t.d. um nýggja PSP-samstarvið og SSP+ samastarvið, sum ætlanin er at seta í verk.

PSP-samstarvið er eitt samstarv millum psykiatri, sosialar myndugleikar og politiið, sum serliga er ætlað borgarum við fjøltáttaðum trupulleikum, sum ikki sjálvir megna at søkja sær hjálp fyri at betra um støðuna. Í Føroyum fer Kriminalforsorgin eisini at verða part av samstarvinum.

SSP+ samstarvið er ætlað ungum millum 18 og 24 ár, sum hava trupulleikar við rúsevnum og óhepnari ella kriminellari atferð. Ætlanin við samstarvinum er at hjálpa og stuðla teimum ungu aftur á beina kós. SSP+ samstarvið fevnir millum annað um politiið, Almannaverkið, ALS, Dugna, Megna Títt Lív og Kriminalforsorgina.

Til spurning 3.
Løgmansskrivstovan hevur havt eitt gott samskifti við borgarstjóran í Tórshavnar kommunu um støðuna, men ongar ítøkiligar samráðingar eru annars við kommunurnar um átøk ímóti harðskapi.

Í Tinganesi, 6.mai 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo